# Smyril Line 207 mió krónur í halli

**Men á Smyril Line hava tey góðar vónir um, at árið í ár fer at hilnast væl. Hetta var jaligi boðskapurin á ársaðalfundinum hjá fyritøkuni. Peter Holm, stjóri, væntar, at úrslitið fyri árið verður ein vinningur á í minsta lagi kr. 13 milliónir**



Klaus Kjærulff, nevndarformaður



Peter Holm, stjóri

SMYRIL LINE
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ársúrslitið fyri 2008 gjørdist eitt hall á kr. 207 milliónir. Sambært stjóranum er hetta fyrst og fremst úrslit av eini munandi niðurskriving av Norrønu á góðar kr. 121 milliónir. Men hann vísti somuleiðis á, at rakstarúrslitið fyri árið var vánaligt, við einum halli á kr. 58 milliónir. Stóra rakstrarhallið gav felagnum gjaldføristrupulleikar, og tað gjørdist tí neyðugt móti ársloki at endurreisa kapitalgrundarlagið. Leiðsla og nevnd arbeiða við at skipa virksemið hjá Smyril Line, soleiðis at raksturin av felagnum verður munandi meira fokuseraður í framtíðini.

Hóast úrslitið hjá Smyril Line var vánaligt í 2008, eru nevnd og leiðsla bjartskygd um framtíðar gongdina. Peter Holm sigur, at sølan higartil í ár gongur eftir ætlan. Harumframt er raksturin betraður munandi við stórum sparingum og við inntøkuøkingum á farmaøkinum. Hetta fegnaðist nevndarformaðurin og fyrrverandi skipsreiðarin, Klaus Kjærulff, um. Umskipanin av rakstrinum bleiv framd um árskiftið og betrar raksturin við samanlagt kr. 70 milliónum. Mett verður tí, at úrslitið hjá Smyril Line 2009 verður í minsta lagi kr. 13 milliónir.

Eftir umskipanina er ferðaætlanin hjá Norrønu tillagað til einans at fevna um tær leiðir, sum hava verið mest eftirspurdar, og sum áður hava verið útseldar í háárstíðini. Við hesari tillaging er kapasiteturin vaksin munandi á hesum leiðum um summarið, tá trýstið er størst. Umskipanin hevur somuleiðis við sær, at stóran part av árinum verður gjørligt at sigla við einum munandi lægri manningartali.

Í januar 2009 vórðu nýggir stabilisatorar av slagnum Sperry settir í Norrønu, og harvið skuldu afturvendandi trupulleikarnir við stabilisatorunum endaliga verið loystir. Hetta ger umstøðurnar hjá ferðafólkunum munandi betri, umframt at hetta minkar nógv um talið av seinkingum.

Peter Holm, stjóri á Smyril Line vísti á, at ein strategisk ætlan er gjørd fyri Smyril Line, soleiðis at søluinnsatsurin hjá felagnum í framtíðini verður munandi meira fokuseraður upp á høvuðsmarknaðirnar: Føroyar, Danmark og Týskland. Ein partur av ætlanini er at arbeiða móti eini munandi øking av søluni á høvuðsmarknaðunum.



# Memotekið frum sýndur í altjóða dansidagin

**Í morgin er altjóða dansidagur. Hendan dagin verður Memotekið, dansistuttfilmurin hjá Marionnu Mørkøre og Rannvá Káradóttir, frumsýndur. Dansistuttfilmurin lýsir kontrastina millum minimalistiska dansin, og villu og litríku føroysku náttúruna**

DANSUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Memotekið er ein nýggjur føroyskur dansistuttfilmur, sum Rannvá Káradóttir og Marianna Mørkøre hava stjórnað og framleitt. Filmurin hevur tvær frumsýningar tann 29. apríl, og er hetta í samband við altjóða Dansidagin. Ein sýning verður í Norðurlandahúsinum, og ein sýning verður á Cinematekinum, á Det Danske Filminstitut, í Keypmannahavn. Harumframt verður filmurin eisini sýndur í ávikavist Ålborg og Århus tann 2. mai.

Memotekið er ein eksperimentellur dansistuttfilmur, har dansur í minimalistiskum formi verður settur í kontrast til ta ríku og villu føroysku náttúrumyndina. Filmurin er tikin upp við Super8-tóli, og gevur hetta filminum eitt ævintýrakent og surrealistiskt sermerki. Dansifilmar eru enn eitt sera nýtt og ungt fyribrigdi, og Memotekið er eitt alternativt boð uppá, hvat ein dansifilmur er og kann rúma.

Jens L. Thomsen hevur gjørt tónleik til filmin. Dansarar eru Kristina Sørensen Ougaard og Matilde Wendelboe Dresler.

Rannvá Káradóttir og Marianna Mørkøre hava arbeitt saman við nógvum ymiskum verkætlanum til bæði film og pall, síðan lokið prógv í London í 2004. Eitt nú kann nevnast: Dukkumentar–videoinstallatión, sum varð framleidd í Kanada 2005, og Investigations of a Dog – audiovisuell framsýning 2007.

Brot úr filminum er at síggja á www.youtube.com/watch?v=RwUAjcwbnuI

# Styrkið kommunala sjálvræðið

**- Kommunusamskipanin óttast, at kommunurnar fáa ikki fleiri uppgávur at umsita kortini. Hetta verður stórt samfelagsligt afturstig, og Heðin Mortensen, formaður í Kommunusamskipanini, heitti tí á aðalfundinum fríggjadagin á landspolitiska myndugleikan um at styrkja kommunala sjálvræðið**

KOMMUNUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Kommunusamskipanin hevði ársaðalfund 24. apríl 2009. Í frágreiðing til aðalfundin fegnaðist Heðin Mortensen, stýrisformaður, um, at tað loksins er komin gongd á ætlanina at fremja ein skipaðan kommunureform.

Hann sipaði í hesum sambandi til arbeiðið, sum landsstýrið hevur sett í verk at gera uppskot til nýggjan kommunubygnað, útlegging serliga av fólkaskúlanum og eldrarøktini til kommunurnar at umsita, eins og broytingar í kommunalu fíggingarskipanini. Hetta fyrsta stigið í arbeiðinum skal verða liðugt á ólavsøku í ár.

Heðin Mortensen vísti tó eisini á, at tað framvegis manglar ein verulig politisk semja um kommunureformin, tí øllum er greitt, at í landsstýrinum og í samgonguni er innanhýsis ósemja serstakliga um útlegging av fólkaskúlanum og eldrarøktini.

Tað tykist tí hava størri týdning hjá landinum at fáa lagt kommunurnar saman og skipa javning, blokkstuðul og felags rakstrar- og íløgukarmar sum amboð at stýra kommunurnar við, heldur enn at skipa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á ein slíkan hátt, at borgarin fær eina betri og meira samanhangandi tænastu, segði Heðin Mortensen.

Kommunusamskipanin óttast tí, at kommunureformurin verður álvarsliga amputeraður, tá til stykkis kemur – at kommunurnar fáa ikki fleiri uppgávur at umsita kortini. Hetta verður stórt samfelagsligt afturstig, og Heðin Mortensen heitti tí at landspolitiska myndugleikan um at standa við høvuðsendamálið við kommunureforminum, sum er at styrkja kommunala sjálvræðið til tess at veita betri tænastur til okkara borgarar.

Heðin Mortensen nam eisini við fíggjarligu støðuna. Hóast fallandi skattainntøkur, so stendur samlaði kommunubúskapurin ikki fyri skrædli, og støðan í dag kann ikki samanberast við kreppuna í nítiárunum. Avbjóðingin í dag er meira at tillaga eitt nøktandi og haldgott tænastustøði til broyttu fíggjarligu fortreytirnar og samstundis skapa fíggjarligt rásarúm til ávíst íløguvirksemi.

Hann gjørdi tó samstundis greitt, at hetta letur seg bert gera, um landið steðgar við at flyta undirskotið í landskassanum yvir í kommunukassarnar, so sum fleiri dømi hava verið um síðstu tíðina.

Í ár eru 10 ár síðan, at Kommunusamskipan Føroya formliga varð stovnað, men søgan hjá felagsskapinum gongur longri aftur, tí kommunurnar høvdu drúgvt samstarv at byggja á. Bæði í limatali og íbúgvaratali er felagsskapurin síðani vaksin, men Heðin Mortensen ásannaði, at við kommunureforminum í huga, gevur tað minni og minni meining at hava tvey kommunufeløg.

Tvørturímóti er tað av stórum týdningi, at Kommunusamskipanin og Kommunufelagið nú fáa savnað allar kommunur í eitt felag, tí kommunureformurin verður størsta avbjóðingin fyri kommunala felagssamstarvið og kommunala sjálvræðið higartil, skrivar kommunusamskipanin í tíðindaskrivi.